tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Klóku høvdini rýma

## *Oddagrein*

Ein av fremstu búskaparfrøðingunum hjá tí almenna er vorðin "head-huntaður" til Grønlands, eins og ein av fremstu føroysku samferðsluserfrøðingunum var tað fyri fáum árum síðani. Í hesum sambandi verður sagt, at klóku høvdini rýma úr almennu umsitingini. Millum nevndu grundir var løn, og at almenna umsitingin ikki virdi menning. Løn vil altíð vera ein faktorur, men almenna umsitingin átti at havt so nógv annað at bjóða uppá.

Hvussu er við tí fakliga kjakinum? Búskaparfrøðingurin var atfinningarsamur móti framløguni av Hvítubók. Afturfyri sýndi landstýrismaðurin í sjálvstýrismálum ein sera ódemokratiskan hugburð og almannakunngjørdi framløguprísin hjá hesum búskaparfrøðingi fyri øllum Føroyum ivaleyst fyri at royna at sáa iva um orsøkina til atfinningarnar. Løgið nokk, so segði Búskapar- og Løgfrøðingafelagið einki í hesum sambandi, hóast hettar var ein potentiellur limur innan teirra øki, ið varð hongdur út. Vit hava her á hesum stað fyrr ávarað móti einsrætting í almennu umsitingini, og tann vandin gerst bert størri við, at teir, ið dittaðu sær at siga nakað annað, enn at tað var ein stórur heiður at verða við í "tí søguliga" hvítabóksarbeiðnum, rýma úr umsitingini.

Tað er lítil ivi um, at búskaparparturin í Hvítubók væl kundi verið betri og meira eintýðugt skrivaður, eisini sæð í ljósinum av íslendsku útrokningunum, ið komu aftaná. Hóast hettar, so er eingin faklig viðmerking til góðskuna av búskaparpartinum í Hvítubók at síggja í eitt nú Nýrit, ið annars hevði verið eitt upplagt forum til fakligt kjak innan umsitingina. Eitt einsrættað arbeiðsumhvørvi, har sjálvstøðug meining ikki verður eggjað, dregur ikki úrmælingar.

Ein onnur fyritreyt fyri at draga úrmælingar til almennu umsitingina, og forða fyri at teir verða stygdir burtur er, at hesir frágreiða til fólk við royndum og góðum fakligum eginleikum. Eisini er týdningarmikið, at arbeiðsfelagarnir eru skikkaðir til sítt arbeiði við teimum pappírum, ið krevjast til eitt nú eitt fulltrúastarv. Tað hava verið dømi um, at fólk hava sitið í deildarleiðarstarvi og enntá hava verið fyribils settir stjórar á stovnum við ongum ella júst fingnum pappírum. Eisini eru dømi, har fólk, ið ikki hava fingið síni kandidatpappírir, hava skrivað stórar frágreiðingar, ið hava verið til aðalorðaskifti og vornar útgivnar sum bók. Hevði slíkt gingið nakra aðrastaðni enn í Føroyum? Hvat siga aðalstjórar og landsstýrismenn? Hvat sigur Búskapar- og Løgfrøðingafelagið til hettar? Er slíkt ikki við til at skapa inflatión í starvsheitum og støði í almennu miðfyrisitingini?

Tað hevur verið frammi, at Norman Christensen bygnaðurin krevur so nógv fólk, at trupult er at finna skikkað fólk, og tískil mugu fólk takast inn beinleiðis av skúlabeinki til at gerast fulltrúar, deildarleiðarar o.s.fr. Um hettar er so, so kann bert staðfestast, at Norman Christensen bygnaðurin ikki passar til føroysk viðurskifti, tí fólkatalið er ov lítið. Farið átti at verið undir at skipa ein í vavi minni bygnað, so tað nálareyga, ið av røttum skuldi tryggjað støðið í miðfyrisitingini, verður til staðar. Starvsfólkapolitikkur vildi tá verið ein spurningur um at viga, velja og menna, heldur enn at royna at skava nóg nógv fólk saman til at fylla inn í nógvu organisatorisku kassarnar hjá Norman Christensen.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Hann kemur ikki í kór, ið sjálvur vil í flór

*»Ørnin hevur so høgt eitt flog, men? Einki hjálpir tað at hava ligið í einum ørnaeggi, um tú alist upp í einum dunnuhyli«*



Hesa hugmynd og vitan hevði danska stórskaldið Henrik Pontoppidan, ið eisini vann Nobels virðislønina í bókmentum í 1917.

Hansara framúr góða lýsing av ørnaunganum, sum nakrir smádreingir høvdu fingið fatur á, og tóku heim til pisu - man hava hugtikið mangan lesara líka frá ti, at »Ørneflugt« varð skrivað í 1894.

Innihaldið og boðskapurin í hesi stuttsøgu, er ikki minni viðkomandi í dag, enn hann var í 1894.

Ikki tí, ørnaungin hevði tað gott saman við tí fína selskapinum, ið helt til í høsnagarðinum hjá presti. Har vóru kákandi hønur, gvaggandi dunnur og jarmandi seyður og sannheitin var tann, at ungin hevði tað so gott, at hann gjørdist bæði ísturmikil og búkstórur.

Síðani var hann beinskerdur, og slapp ongan veg sjálvt, um hansara viðføddu ørnalyndi onkuntíð eggjaði honum til frælsi í fríum lofti.

Sjálvt um hann fleiri ferðir gjørdi royndir at sleppa upp um gyrðingina, eydnaðist hetta ikki. Hesin kongaligi háborni fuglur var enntá so niðurundir komin at hann var bangin fyri at flúgva, og bangin fyri at missa mettuna úr dunnuhylinum, heldur enn at nýta síni framúr góðu og sjálvsøgdu veiðievni, sum einihvørjari ørn eru í holdið borið.

Kortini bar soleiðis á ein vakran várdag, at eitt frískt lot smeyg sær inn yvir dunnugarðin, og uttan rættiliga at vita av tí, breiddi ørnin veingir sínar út, og alt í einum var hon á flogi og í leysum lofti.

Nú átti frøi og gaman at verið í hásæti, men trúgv tí ella ei. So sterkur var longsulin eftir lættvunnu mettuni í dunnugarðinum, at hesin annars mæti fuglur sjálvur vendi við á hálvari leið, og vildi aftur í garðin.

Henda skeiva avgerð, varð ørnini at bana. Tá hon sveimaði yvir dunnugarðinum og skuldi seta seg, small eitt skot. Ørnin hvarv í fjaðraroki og small deyð niður í hylin. Sanniliga ein syndarligur ørnadeyði.

Hví dugdi ørnin ikki at umsita frælsið?

Stundum líkjast fuglar og fólk.

Fyri mongum hundrað árum síðani flýddu nakrir stinnir garpar av Noregslandi vestur í hav. Teir rýmdu undan harðræði og trælkan, og vilduinna sær frælsi. Kosta hvat tað kosta vildi.

Nakrir tóku búgv í Føroyum. Aðrir hildu leiðina fram til Íslands. Íslendingar og føroyingar eru ættkomnir av hesum frílyntu monnum. Ofta hevur lagnan verið hørð hjá hesum smátjóðum. Íslendingar hava í mongum førum verið stavnin fremri enn føroyingar. Eisini, tá ið frælsið skuldi vinnast.

Onkur ørnaungin fanst har uppi, sum dugur var í. Tá var byrsan ikki uppfunnin, men øksin og gálgin vóru eisini hættislig vápn fyri veingjaleysar ørnin tá í tíðini.

Her í Føroyum hava sanniliga eisini frælslyntir fuglar funnist.

Nólsoyar Páll var ein, ið vildi vinna landsmonnum sínum sámulig kor og frælsi. Men hann hvarv á løgnan hátt mitt í hesum stríði. Langabbasonur hansara Jóannes bóndin, hevði sama frælsa lyndi og vilja, men fyri hann vórðu fótonglar lagdir av allahanda slag og av hansara egnu landsmonnum.

Líkt er til, at í hesum døgum er aftur eitt frískt lot við at taka seg upp í okkara frælsisstríði. Og líkt er eisini til, at hesa ferð verður tað meira enn bara ein ungi, ið er búgvin at fara á flog í ein landsynning og við skinsemi koma aftur við góðum og frælslyntum tíðindum. Men sini vælmeint ráð fari eg at geva tykkum, ið skulu niður til Danmarkar at samráðast um frælsi.

Gott í tykkum, latið tað ikki frættast um lond, at summir føroyingar nú eru farnir at gera gjøldur við sínum egna merki, og halda tað vera fjant og fjas at okkara merki verður vundið á stong í ST.

Nei berið tit høvur hátt og minnist til, at: ikki kemur hann í kór, ið sjálvur vil í flór. Góða eydnu.

**Sjúrður Poulsen**

# Javnaðarfundir í Norðstreymi



JAN MÜLLER

Norðstreymoyar Javnaðarfelag fer nú undir eina fundarrøð í teimum ymisku bygdunum í Norðstreymi.

Byrjað verður í Vík týskvøldið kl. 20.30. Síðan er ætlanin, at fundir verða hildnir í hinum bygdunum seinni. Í einari viðmerking sigur formaðurin Thomas Arabo, at ætlanin er at fáa støðuna hjá vanliga borgaranum til tey stórmálini, ið eru á dagsskrá.

Størsta málið er sjálvandi framtíðarsamstarvið við Danmark, og tað er eingin loyna, at fleiri av limum felagsins seta stórt spurnartekin við fleiri yvirtøkur, nú tað vísir seg, at landsstýrið als ikki megnar at umsita fleiri av teimum málsøkjum, ið nú hava verið yvirtikin í nógv ár vísir Thomas Arabo á og leggur aftrat:

– Hettar so serliga, tá talan er um tvey so eym mál fyri javnaðarfólk sum almanna- og heilsumál. Vit vóna at fáa ein góðan fund nú týskvøldið og seinni í hinum bygdunum sigur Thomas Arabo at enda.

# Løgmaður hyggur eftir uppsøgnini

*Løgmaður lovar Jákupi Mørkøre at fáa svar upp á kæruna um uppsøgnina, tá tíðin er búgvin til tess*

JOHN JOHANNESSEN



– Áheitanin frá Jákupi Mørkøre á meg um at kanna uppsøgnina av sær verður í løtuni viðgjørd í landsstýrinum, og hann skal nokk fáa svar.

Løgmaður hevur fingið brævið frá Jákupi Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðara, har hann heitir á løgmann um at kanna leiklutin hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum viðvíkjandi uppsøgnini av sær.

Anfinn Kalsberg heldur ikki, at hann eigur at blanda seg í málið um uppsøgnina av Jákupi Mørkøre, tí hetta er eitt mál, ið Helena Dam á Neystabø, sum landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, eigur. Men løgmaður fer kortini at hyggja upp á brævið frá Jákupi Mørkøre. Ein av skyldum hansara, sum løgmaður, er nevniliga at hava eftirlit við landsstýrisfólkunum.



# Funnu ikki breiðu semjuna

*Løgmaður ásannar, at kaffifundirnir við andstøðuflokkarnar ikki góvu breiðu semjuna, hann hevði ætlað. Men løgmaður trýr tó enn upp á stuðul frá Javnaðarflokkinum í fullveldismálinum*



*Løgmaður ásannar, at tað ikki eydnaðist at finna breiðu semjuna undir politisku prosessini, men hann hevur kortini ikki mist vónina*

JOHN JOHANNESSEN

– Tað er rætt, at tað ikki hevur eydnast okkum at funnið fram til nakra breiða semju í málinum um ríkisrættarligu støðuna.

Anfinn Kallsberg, løgmaður ásannar, at kaffifundirnir í Tinganesi við andstøðuflokkarnar um fullveldismálið ikki hava givið tað úrslit, hann hevði ætlað.

Løgmaður meldaði nevniliga í fjør heyst út, at hann ætlaði at finna eina breiða semju í málinum um ríkisrættarligu støðuna, ið eisini fevndi um andstøðuflokkarnar. Semjuna væntaði hann at finna í uttanlandsnevndini.

Men tá formaður Javnaðarfloksins gjørdi greitt, at hann ikki væntaði nakra semju í uttanlandsnevndini, meldaði løgmaður út, at semjan skuldi finnast í einari politiskari prosess, áðrenn málið fór í uttanlandsnevndina. Hesa útsøgn hevur løgmaður staðið fast við líka til dagin í dag.

– Politiska prosessin er liðug, men vit eru ikki komin fram til nakra semju. Men tað er heilt greitt, at hon hevur avklárað nøkur ting, sigur løgmaður.

### Væntar stuðul frá Javnaðarflokkinum

Løgmaður hevur tó ikki mist vónina um breiðu semjuna. Hann trýr enn upp á, at farið verður til Danmarkar at samráðast um ein nýggjan sáttmála við stuðuli frá Javnaðarflokkinum.

– Í politisku prosessini hava vit havt eitt ógvuliga konstruktivt kjak um málið, og nú skilja partarnir hvønn annan, eins og Jóannes Eidesgaard hevur sagt, sigur løgmaður og leggur afturat, at uppritið til uttanlandsnevndina er tillagað kjakinum.

Løgmaður vísir á, at eftir hansara tykki, eru málsetningarnir hjá samgonguni og Javnaðarflokkinum í málinum um ríkisrættarligu støðuna ikki so ógvuliga langt frá hvørjum ørðum.

– Flokkarnir eru kunnaðir um ætlanirnar, men teir hava ikki sæð uppritið, og tí hevur ikki borið til hjá teimum, at sagt, um teir taka undir við tí ella ikki.

– Men undir viðgerðini í uttanlandsnevndini vænti eg tó, at semjan verður funnin, ger løgmaður greitt.

Tá løgmaður tosar um breiða semju, meinar hann við eina semju millum samgonguna, Miðflokkin og Javnaðarflokkin. Hann sigur seg vera greiðan yvir, at tað ikki kann væntast, at Sambandsflokkurin verður við í semjuni. Sambandsflokkurin hevur nevniliga fleiri ferðir meldað út, at hann ikki fer at taka undir við nøkrum av tí, hann er vorðin kunnaður um á sokallaðu kaffifundunum.

### Mangir leikir í longum talvi

Anfinn Kalsberg sigur seg hvørki kunna siga, hvat hann væntar, at samráðingarnar við donsku stjórnina fara at enda við ella nær tær vera. Hann vísir á, at mangir leikir eru í longum talvi, og metir hann sína uppgávu vera at umhugsa hesar leikir gjølla, soleiðis at tað best møguliga fæst burturúr.

Hóast útsagnir hjá Høgna Hoydal og Jóannesi Eidesgaard seinast í farnu viku bendu á, at eins langt er millum støðuna hjá samgonguni og Javnaðarflokkinum, sum tað var áðrenn polititisku prosessina, hevur løgmaður enn góðar vónir, um rætt verður leikt í talvinum.

Løgmaður heldur ikki, at útsagnirnar hjá Høgna Hoydal í Degi og Viku hóskvøldið vóru so bombastiskar, sum Jóannes Eidesgaard gjørdi tær til.

Jóannes Eidesgaard helt, at Høgni Hoydal gjørdi heilt greitt, at tað, sum landsstýrið vil, er fullveldi við egnari grundlóg uttan fyri ríkisfelagsskapin. Hetta segði Jóannes Eidesgaard seg ikki kunna góðtaka.

Men løgmaður trýr fult og fast uppá, at Javnaðarflokkurin verður við. Og, sum skilst á løgmanni, er ikki vist, at samráðingaruppleggið fer at leggja upp til fullveldi við egnari grundlóg uttan fyri ríkisfelagsskapin. Tó vil løgmaður einki siga um hetta.

### Ikki gloppið av hondum

Hóast tað miseydnaðist løgmanni at finna fram til ta breiðu semjuna á sokallaðu kaffifundunum undir politisku prosessini, hóast útsagnirnar hjá Høgna Hoydal í Degi og Viku hóskvøldið og hóast tað hevur verið Høgni Hoydal, ið hevur ført orðið úteftir í fullveldismálinum, metir løgmaður ikki, at málið er gloppið honum av honum.

– Mín leiklutur er framvegis at finna eina so breiða semju, sum gjørligt og at fáa eitt so gott samráðingarupplegg, sum gjørligt.

Løgmaður vísir ikki aftur, at partur av hesari uppgávu er at halda saman uppá Javnaðarflokkin á einum veingi og Tjóðveldisflokkin á einum øðrum veingi.

### Samráðast í vár

– Eg kann ikki siga nágreiniliga nær farið verður til Danmarkar at samráðast um ríkisrættarligu støðuna, men eg vóni tó, at tað verður í vár.

Sosialurin hevur fyrr gitt, at samráðingarnar fara at byrja einaferð um mánaðarskiftið mars, apríl, men løgmaður sigur seg ikki kunna svara, um hetta er rætt gitt.

Anfinn Kallsberg ætlar sær at geva uttanlandsnevndini alla ta tíð, henni tørvar, til at viðgera samráðingaruppleggið. Tí talan er um eitt álvarsmál.

# Uppritið seinkað

*Uttanlandsnevndin slapp ikki eins og ætlað at viðgera samráðingaruppritið á fundinum fyrrapartin í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Uppritið til samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna var ikki klárt, tá fundurin hjá uttanlandsnevndini varð settur klokkan tíggju fyrrapartin í gjár.

Løgmaður hevur tá ikki skrivað undir uppritið, og sum Sosialurin skilti á honum, var hetta tí, at enn vóru onkrir tekniskir smálutir eftir at kjakast um í landsstýrinum.

Formaðurin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, sigur, at hann fekk boð frá løgmanni um, at hann kundi vænta sær at fáa uppritið einaferð um ellivu tíðina. Men heldur ikki tá var uppritið klárt, og tí gjørdi formaðurin av at slíta fundin, tá málini á dagsskránni vóru liðugt viðgjørd.

Hergeir Nielsen segði seg á middegi í gjár hava vónir um at fáa uppritið seinni á degnum, og umhugsaði hann tá at kalla saman aftur til fund í uttanlandsnevndini eftir tingfundin.

Um formaðurin í uttanlandsnevndini fekk uppritið og um uttanlandsnevndin hevði fund eftir tingfundin, eydnaðist okkum ikki at fáa at vita áðrenn blaðið fór til prentingar seinnapartin í gjár.

